# Eitt frískt lot á ólavsøku



*Leikandi løtt penslastrok frá Ingálvi av Reyni*



*Grøn glaslist á lørifti frá Tróndi Paturssyni*



*Helgi Fossádal úr Listafelagnum frammanfyri mest áloypandi myndunum á ársins ólavsøkuframsýning, sum Bárður Oskarsson hevur málað*



*Smáar søgur í rúmi við rammu frá Hanni Bjartalíð*



*Hús, lyktir, starar og perur er millum myndevnini hjá Símin Poulsen*

**Ársins ólavsøkuframsýning í Listaskálanum er heppin. Hon ýður av ungum, ókendum og evnaríkum fólkum, sum peika frameftir í føroyska listalandslagnum. Tey royndu, sum í onkrum førum hava fingið nýggj slett á løriftini, hava kortini eisini fingið gott plass í framsýningini, sum Helgi Fossádal kallar ta frægastu í áravís**

**Fakta**

## Ólavsøkuframsýningin

Í Listaskálanum 28. til 31. juli

| | |
|---|---|
| Ólavsøkuaftan | kl. 14 – 20 |
| Ólavsøkudag | kl. 14 – 20 |
| 30. juli | kl. 11 – 17 |
| 31. juli | kl. 11 – 17 |

LISTAFRAMSÝNING

*Tekstur: Ingi Rasmussen*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Longu tá tú kemur inn í Listaskálan fært tú sum frammaná.

Krypladu kropparnir hjá Bárði Oskarssyni, sum bæði eru álíkir fostrum og verum úr helheimi, er einki tú ynskir tær at hava hangandi í spísistovuni. Men tær bera tær boð um okkurt ófrættakent og ókent.

Samstundis bera myndirnar boð um, at ársins ólavsøkuframsýning er eitt sindur øðrvísi og fRískari enn tær undanfarnu. Her eru nýggir tónar í luftini, hóast tað aftur eru tær roynd kreftirnar, sum leggja botnin.

– Ein fín framsýning, um eg skal siga tað sjálvur, sigur Helgi Fossádal, kassameistari í Listafelagnum, tá hann vísir okkum runt.

### Skilagóðir veggir

Nevndin í Listafelagnum er dómsnevnd og vigar innkomnu listaverkini. Hesaferð eru 40 fólk umboðað á ólavsøkuframsýningini við 145 verkum. 23 fólk sluppu ikki gjøgnum nálareygað.

Her eru stórir og smáir oljumálningar, vatnlitir, fotomyndir, blýantstekningar og søkjandi uppsetingar. Plássið er ikki nøktandi til stórar framsýningar, viðgongur Helgi Fossádal, men hann heldur kortini, at ólavsøkuframsýningin hongur væl í ár, og tað er ber til, tí skilaveggir eru settir eftir gólvinum.

– Framsýningin er rólig, harmonisk og hongur væl saman. Her er fitt av nýggjum, og tað dámar mær væl. Tað er stuttligt at síggja, hvussu tey ungu vísa, hvussu evnarík listafólk, vit eiga, sigur Helgi Fossádal, sum sjálvur kallar framsýningina ta frægastu í nógv ár.

### Musikkur av Reyni

Nógv frískt blóð, men eisini onkur nýggj strok hómast frá onkrum av teimum gomlu.

Hóast Bárður Jákupsson framvegis er eyðkendur, so eru sjónligir nýggir litir og gráir blettir, ið minna um mosagrótið á Kirkjubøreyni.

Av teimum royndu er tað aftur Ingálvur av Reyni, sum skarar framúr. Og hóast Helgi Fossádal helst ikki vil taka nakran framúr, so fær hann ikki hildið lovorðunum aftur, tá vit ganga fram við teimum 10 vatnlitsmyndunum hjá meistaranum.

– Strokini hjá Ingálv, sigur hann doymandi og summar seg. Tey eru so løtt og frí. Sum musikkur. Hann er so ómetaliga góður, sigur hann og staðfestir, at orðini ongantíð røkka, tá tú skalt siga, hvussu list ávirkar teg.

Ingálvur hevur hesaferð hildið seg til akvarelllitirnar. Einfaldir litir á hvítt pappír við teksti afturvið gera myndirnar til yrkingar, ið kunnu siga eina søgu, um tú gevur tær stundir.

Annars eru teir etableraðu tryggir uttan at spreingja karmar. Kári Sverrison hevur fýra eyðkendar kraftmiklar oljumálningar, Tróndur Patursson hevur serliga ein góðan grønan, Eyðun av Reyni, Amariel Norðoy og Øssur Mohr eru litfagrir, sum vit kenna teir, og Philipp Carré er enn hugtikin av at skráseta bygdir á listarlig landkort.

### Starandi starar

Niðri í trappunum, har fólk ofta eru misnøgd við at enda í skýmaskoti, hitta vit ta bert 14 ára gomlu Ragnhild Dam á bróstinum. Fínar myndir, nevndar Lot, Ódn og Slit, ið sýna hugflog og talent. Rammurnar er nakað kraftmiklar og taka í so nógv frá myndunum. Men, sum Helgi sigur: »Lad gå, hon er so ung enn.«

Í kjallaranum hongur eisini Jógvan S. Biskupstø úr Vestmanna, sum gongur á listaskúla í Kina. Tað líkist mest Hestoynni í vatnlitum, men okkurt orientalskt vindblak er eisini stroytt á vatnlitirnar.

Uppafturkomin síggja vit Hanni Bjartalíð, sum altíð hugtekur. Gott hugflog og altíð okkurt øðrvísi. Hesaferð hevur hann sett smáar søgur í rammur við rúmi, har pláss er fyri smáum lutum. Søgur, sum hann er komin fram á, meðan hann hevur tosað í telefon ella gjørt aðrar gerandissýslur.

Símin Poulsen frá Verkstaðnum undir Brúnni fær smílið fram. Ein autistiskur Picasso, freistast tú at siga, sum gevur innlit í eina hugtakandi verð, har tú ikki kanst lata vera við at stara eftir starunum. Ella eru tað stararnir, sum stara at tær?

### Ársins kjakevni

Neyðugt er at taka ungu Anniku á Lofti við, tí hon verður helst ársins kjakevni. Hon hevur neglt teyggjur av turrum fiski til eitt lørift og smurt brúnsvarta spillolju omaná. Heitið »Oljan og vinnan« er ein dekorativ áminning um, hvussu vit fara um okkara náttúru og kundi hóskandi hingið í Oljumálaráðnum, sum hevur umhvørvismál um hendi.

Yvirhøvur eru fleiri nýggj nøvn, sum nógv okkara ongantíð hava hoyrt áður í listahøpi, og hóast fleiri teirra langt frá eru liðugt búnað sum listafólk, so eru tey eitt frískt lot í ólavsøkuframsýningini, sum tíbetur eisini peikar frameftir hesaferð.

Vónleyst er at nevna øll fólk og verk, og í grundini er tað eisini líkamikið: List skal upplivast í Skálanum.

**Fakta**

## Ársins nøvn á ólavsøkuframsýningini:

| | |
|---|---|
| Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir | Anker Mortensen |
| Carsten M. Arnskov | Finleif Mortensen |
| Jógvan S. Biskupstø | Maria Mørkøre |
| Hanni Bjartalíð | Rógvi Nielsen |
| Sámal Blak | Amariel Norðoy |
| Philipp Carré | Jensina Olsen |
| Ragnhild Dam | Bárður Oskarsson |
| Sunva Eysturoy | Brandur Patursson |
| Bárður Jákupsson | Tróndur Patursson |
| Arngerð Joensen | Vígdis Petersen |
| Hergerð Joensen | Petsia |
| Jón Magnus Joensen | Símin Poulsen |
| Tóra Joensen | Eyðun av Reyni |
| Heðin Kambsdal | Heri av Reyni |
| Agnar Lamhauge | Ingálvur av Reyni |
| Annika á Lofti | Anna Seppala |
| Randi Martin | Hannah Skarsholm |
| Josias Matras | Ásla Rannvá Svensson |
| Petur Mikkelsen | Kári Svensson |
| Øssur Mohr | Siri Helgadóttir Tórgarð |